# ítróttur

Nr. 11 • fríggjadagur • 17. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


Føroyar-Belgia 22-22 (10-12):

# Stríðsviljin sigraði



*Heini Joensen syrgdi fyri, at Føroyar fingu eina flúgvandi byrjan, men eftir at hava skotið fýra av fyrstu átta málum okkara, varð hann mansvardur at kalla restina av dystinum*

**Føroyar fingu bara javnleik móti einum belgiskum liði, sum avgjørt var til at tosa við. Men fyritreytirnar hjá okkara monnum vóru avgjørt ikki tær bestu, og tí var neyðugt at lata seg í stríðshamin – og tað gjørdu leikararnir eisini**


LANDSDYSTUR
*orð: Jákup Mørk*
*Myndir: Álvur Haraldsen*


Sámal Joensen, Áki Mørk, Tróndur Joensen, Sveinur Justinussen og at enda Áki Olsen. Uttan iva er her talan um nakrar av sterkastu bakspælarunum, sum føroyskur hondbóltur eigur, men samstundis er hetta listin yvir leikarar, sum Lars Nedergaard mátti vera fyriuttan, tá føroyska landsliðið skuldi royna seg í seinasta heimadystinum á hesum sinni.

Meðan teir báðir fyrst nevndu longu høvdu givið avboð vegna skaðar og skurðviðgerðir, fekk Tróndur Joensen av arbeiðsávum ikki verið við. Sveinur Justinussen hevur staðið seg væl, síðani hann kom í hópin, men hann var lagstur í songina við fepuri, og tá Áki Olsen eftir bert fáum minuttum mátti staðfesta, at eymi lærkrikin ikki stóð ímóti trýstinum, sá svart út hjá føroyska landsliðnum. Og so kann eisini leggjast afturat, Mortan Hansen hevði verið sjúkur í vikuni, og tí als ikki var so væl fyri, sum hann annars átti at veri.

## Byrjaðu væl

Hóast alt hetta, so kann ikki sigast annað enn, at føroyska liðið fekk eina góða byrjan upp á dystin móti Belgia, sum saman við føroyingum varð mett sum veikasta liðið í okkara undankappingarbólki.

Alt fyri eitt var greitt, at belgiska spælið so langt ífrá var á hædd við tað, sum finnlendingar og ísraelittar sýndu, tá teir vitjaðu. Spælið gekk als ikki so skjótt fyri seg, sum tað annars hevur gjørt, og kropsliga tóktust okkara menn heldur ikki hava trupulleikar við at standa seg. Alt hetta viðvirkaði til, at áskoðararnir alt fyri eitt fingu kensluna av, at hendan dystin kundi føroyska liðið eins væl vinna sum nakað annað.

Og tó at tað gekk rættiliga javnt á, so kendist tað eisini, sum okkara menn høvdu eina lítla yvirvág. Ikki minst tí skotstyrkin hjá Heina Joensen tóktist vera størri, enn belgiska liðið hevði givið sær far um, og eftir at hava bombað fýra av fyrstu átta føroysku málunum, mátti kollfirðingurin lata sær lynda at verða mansvardur at kalla restina av dystinum.

At føroyska liðið so eisini eftir 68:30 minuttir, loksins skoraði upp á brotskast, mundi eisini lyfta huglagið á leikarunum nakað. Hesa ferð varð Áki G. Olsen sendur á vøllin, tá Áki Olsen varð togaður í gjøgnumbrotsroynd, og so mundi trúgvin av álvara vera til staðar.

## Missirnir kostaðu

Tað var tó hinvegin eisini skjótt greitt, at hóast fyribils yvirvágina, so kundi tað gerast meira enn trupult hjá okkara monnum at halda fast um leiðsluna. Áki Olsen gekk yvir til beinkin, so hann kundi leggjast afturat langa skaðalistanum hjá landsliðnum, og tá Halgir Dahl Olesen, sum annars vildi verið náttúrligur avloysari á plássinum, ikki tóktist hava sín besta dag, kom av álvara stígur í.

Føroyska liðið helt tó fast eina løtu, og við støðuni 10-8 vóru allir møguleikar til at gera eitt veruligt lop, soleiðis at hampuligur munur kundi verið í steðginum, men so gjørdist tó ikki. Belgia fekk ístaðin strítt seg upp á javnt, og tað gjørdist alt meira sjónligt, at væntandi breiddi hjá okkum á bakplássunum kundi kosta nógv. Í øllum førum førdu tvey fullkomuliga óneyðug mistøk beint fyri steðgin við sær, at Belgia kundi kontra tvær ferðir, og vóru okkara brádliga aftanfyri.

## Endaði við gysara

Tað var tó skjótt, at mótbrekkan undan steðginum varð løgd afturum. Liðið bleiv umskipað nakað í steðginum, soleiðis at Ingi Olsen nú var á óvanda plássinum sum vinstri bakkur, meðan Ági G. Olsen varð settur sum miðspælari, og skjótt fekst samband aftur.

Ikki minst tí belgiska liðið tóktist eitt sindur ørkymlað av, at føroyska spælið nú var fullkomuliga umlagt. Mansverjan av Heina Joensen førdi við sær, at tað var so sum so við skothóttanum útifrá, og tí gjørdist neyðugt við skjótum spælið, sum kundi føra gjøgnumbrot við sær. Og fortreytirnar fyri hesum gjørdust kanska ikki verri av, at mótstøðumenninir hildu fast um mansverjuna, soleiðis at talan ofta gjørdist um fimm ímóti fimm.

Brotini ígjøgnum mótstøðuverjuna vóru fleiri, og ofta endaðu hesi við brotskasti, tá togan og haldan var einasti møguleiki at halda okkara monnum, og tá Mortan Hansen eina løtu tóktist senda øll hesi í meskarnar, kom áskoðarafjøldin av álvara við føroyska liðnum.



*Ikki minst kom stríðsviljin hjá føroyska liðnum til sjóndar í verjupartinum, har teir ferð eftir ferð vóru á kroppinum a mótstøðumonnunum, sum oftani ikki vistu síni livandi ráð, tá gjøgnumbrot skuldu skapast*



Verjuparturin á føroyska liðnum riggaði nú eisini munandi betri, enn hann hevði gjørt. Belgiska liðið hevði oftani sera trupult við at spæla seg ígjøgnum. Kombinatiónirnar, sum í fyrra hálvleiki fleiri ferðir spældu strikuna púrasta blanka, fingu ikki eins lætt spæl longur, og eit skfiti var líkt til, at okkara menn veruliga skuldu gera sær dælt av hesum.

Men seinasta løtan gjørdist ein sannur gysari. At møðin gjørdi um seg hjá okkara, var sjálvsagt, nú hvíldin hjá leikarunum var millum lítil og eingin. Og tá Mortan so eisini misnýtti eitt brotskast, fóru nervarnir av álvara at bila. Løtu seinni fingu Føroyar aftur møguleikan. Hálvur annar minuttur var eftir, tá Heini Joensen varð togaður niður í gjøgnumbroti. Hóast hann júst hevði brent, varð Mortan enn einaferð sendur fram, men heldur ikki hesa ferð riggaði, og tá Belgia so skoraði í næsta álopinum, stóð heilt illa til.

Og so kom støðan aftur. Brotskastið. Hesaferð varð Ingi tikin í gjøgnumbrotið, og eina løtu sá út, sum um føroysku leikararnir ivaðust í, hvør skuldi taka. Uppgávan endaði tó hjá Heina, og tó at málverjin royndi at darva honum, so savnaði hann seg um uppgávuna og høgdi bóltin inn til endaliga javnleikin.

## Viljin var vegurin

Samanumtikið má sigast um dystin, at úrslitið kanska fyrst og fremst varð rokkið, tí Belgia ikki hevði eitt lið, sum var í nær námind sama flokki, sum tað hjá Ísrael ella Finnlandi. Kanska er tað ein djarvur pástandur, men tað er lítið at ivast í, at høvdu okkara menn havt allar leikarar tøkar, so vildi talan uttan iva verið um ein sigur, men hann kom so ikki á hesum sinni.

Hinvegin er einki at dylja yvir, at tá umstøðurnar nú gjørdist soleiðis við fólkinum, so var tað eitt framúr liðavrik, sum okkara menn sýndu. Leikararnir, sum vóru burturfrá, kunnu ikki á nakran hátt roknast sum marginalspælarar, og tí varð sera stór ábyrgd løgd á teir, sum nú vóru eftir. Ein ábyrgd, sum teir tó megnaðu at lyfta somikið væl, at í øllum førum eitt stig fekst burturúr.

Hvussu verður við returdystinum, sum skal leikast leygardagin, er ilt at siga. Mótstøðumenninir hesa ferð iðraðu seg kanska eisini um, at teir ikki høvdu onkrar av sínum leikarum við til dystin, men tað kunnu okkara sum so ikki taka støðu til. Heldur ikki kunnu vit taka støði í, hvørjir leikarar eru við ella ikki. Útgangsstøðið má vera teir leikararnir, sum eru tøkir til uppgávuna, men verður hugburðurin tann sami leygardagin, so fer tað neyvan at ganga av leið kortini. Viljin ber langt í so máta, og tað var kanska týdningarmesta staðfestingin mikukvøldið.

### Føroysku hagtølini fyri dystin

Málskjúttar: Ingi Olsen 5(2), Heini Joensen 5(1), Áki G. Olsen 4(1), Mortan Hansen 3(3), Martin Hummeland 2, Bárður Brimvík 2, Áki Olsen 1
Brotskøst: 9
Útvísingar: 3




*Fyri Inga Olsen mundi tað vera ein óvand støða, nú umstøðurnar noyddu hann yvir á bakkin, har hann annars ikki hevur spælt í fleiri ár*

## EM-undankappingin

**Bólkur 1**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Litava | 5 | 3 - 1 - 1 | 117 | 102 | 15 | 7 |
| 2 Slovakia | 5 | 2 - 1 - 2 | 121 | 122 | -1 | 4 |
| 3 Grikkaland | 4 | 2 - 0 - 2 | 87 | 89 | -2 | 4 |
| 4 Italia | 4 | 1 - 0 - 3 | 87 | 89 | -2 | 2 |

Bólkur 2

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Hvítarussland | 4 | 4 - 0 - 0 | 123 | 97 | 26 | 8 |
| 2 Noreg | 4 | 3 - 0 - 1 | 133 | 94 | 39 | 6 |
| 3 Rumenia | 5 | 2 - 0 - 3 | 142 | 149 | -7 | 4 |
| 4 Luksemburg | 5 | 0 - 0 - 5 | 107 | 165 | -58 | 0 |

Bólkur 3

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Finnland | 5 | 5 - 0 - 0 | 135 | 104 | 31 | 10 |
| 2 Ísrael | 5 | 4 - 0 - 1 | 135 | 104 | 31 | 8 |
| 3 Belgia | 5 | 0 - 1 - 4 | 109 | 136 | -27 | 0 |
| 4 Føroyar | 5 | 0 - 1 - 4 | 93 | 136 | -43 | 0 |

Bólkur 4

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Turkaland | 5 | 5 - 0 - 0 | 155 | 166 | -11 | 10 |
| 2 Eysturríki | 5 | 4 - 0 - 1 | 154 | 112 | 42 | 8 |
| 3 Cypros | 6 | 1 - 0 - 5 | 129 | 159 | -30 | 2 |
| 4 Georgia | 6 | 1 - 0 - 5 | 142 | 193 | -51 | 2 |

Bólkur 5

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sveis | 5 | 4 - 0 - 1 | 149 | 120 | 29 | 8 |
| 2 Makedonia | 5 | 4 - 0 - 1 | 172 | 145 | 27 | 8 |
| 3 Letland | 5 | 2 - 0 - 3 | 139 | 155 | -16 | 4 |
| 4 Bulgaria | 5 | 0 - 0 - 5 | 126 | 166 | -40 | 0 |

Bólkur 6

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ukraina | 5 | 4 - 0 - 1 | 120 | 89 | 31 | 8 |
| 2 Bosnia-Hersegovina | 5 | 4 - 1 - 0 | 111 | 95 | 16 | 8 |
| 3 Holland | 4 | 0 - 0 - 4 | 79 | 101 | -22 | 0 |
| 4 Estland | 4 | 0 - 1 - 3 | 72 | 97 | -25 | 0 |